# Eisini samtyktur í fólkatinginum



Stutt fyri miðdag í dag samtykti ein politiskur meiriluti umfatandi hjálparpakkan fyri danska fíggjarsektorin, sum løgtingið samtykti í nátt. Talan var um ein stóran meiriluta, har bert Eindarlistin atkvøddi ímóti. Samtyktin merkir, at danskar og altjóða fíggjarligar fyritøkur kunnu lána pening til peningastovnarnar í Danmark. Nú er full trygd fyri lánunum. Lógin fær gildi við afturvirkandi kraft, 5. oktober 2008. Búskapar- og vinnumálaráðharrin, Lene Espersen, er fegini um avgerðina. – Við lógini kunnu allir bankakundar, fyritøkur og fíggjarligir lánsveitarar – uttan mun til støddina av innlánunum – vera púra tryggir við at hava pengarnar standandi í bankanum, sigur Lene Espersen við Børsen. Síðani pakkin varð lagdur fram mánanáttina, hava næstan allir peningastovnarnir tikið av tilboðnum. Bert Lægernes Pensionsbank hevur sagt nei takk.

sjóvegis av Havnini. Vit fingu so sett eina rutu í sigling av Hvítanesi yvir um til Kaldbaks, meðan vegurin allan vegin av Hvítanesi inn í Kaldbaksbotn og út aftur til Kaldbaks varð gjørdur. Hetta var eitt ódnartak, sum Havnar kommuna tók á seg. Men hetta var samstundis einasta treyt, sum Kaldbak setti fyri at leggja saman, nevniliga at fáa vegasamband, sigur Heðin Mortensen.

Men tað hendi eisini nógv á øðrum økjum. Ljós kom á niðara vøll í Gundadali, ovari vøllur kom, sum seinni eisini fekk graslíki, tveir nýggir ringvegir eru komnir longur og longur úti, og hin nýggjast ætlaði gongur heilt har uppi, sum Stóratjørn skal verða, fyri at nevna okkurt úr stóru rúgvuni, sum er hent seinastu 36 áruni í Havn.

### Politikkur kom uppí

Øll tey fyrstu árini, Heðin Mortensen sat í býráðnum, sat hann fyri borgaraflokkin, sum ikki var politiskur. Hetta var samstundis nógv tann største flokkurin í býráðnum.

- Tað var ein spennandi tíð. Har vóru fleiri, sum sótu saman við mær, m.a. Ingi Mohr, Dánjal Larsen, Børge Persson og sjálvandi Petur í Gong, sigur Heðin Mortensen.

Seinni gjørdist býráðsarbeiðið meiri politiskt, og harvið eisini meiri skipað.

- Tað var tá, eg fór upp í Sambandsflokkin, og eg meldaði meg inn í góðari tíð undan valinum í 1988, fyri at ongin ivi skuldi verða um, hvat eg ætlaði. Eg varð so stillaður upp har og kom inn í einum politiskum flokki, sigur Heðin Mortensen.

Men Heðin Mortensen hevði eisini valt at stilla upp til fólkatings og løgtingsval fyri Sambandsflokkin, og tí var tað náttúrligt, at hann eisini stillaði upp til býráðsvalið fyri sama flokk.

### Vildi hava mest burturúr

- Eg havi so sitið í býráðnum síðan, og kom inn við næstflest atkvøðum til valið seinast og varð fyrst valdur á sambandslistanum. Eg metti tá, at samstarvið við Fólkaflokkin var so nógv slitið eftir fýra árum, sigur Heðin Mortensen.

Hann metti tí, at tað var rætt at royna okkurt nýtt, umframt at tað vóru ting sum gjørdu, at hann ikki kundi halda fram.

- Tí royndi eg at bera so í bandi, at Sambandsflokkurin kundi koma í eina góða støðu við ávirkan, men tað vísti seg, at tað var ikki tað, flokkurin vildi, og tí segði eg stopp, sigur Heðin Mortensen.

Hann vísir á, at tá mann ikki vildi fáa ávirkan, so kundi hann ikki longur fylgja við.

- Eg fekk jú so nógvar atkvøður, at eg hálaði hini bæði inn við mær, vísir Heðin Mortensen á.

Hann heldur ikki, at munurin á býráðspolitikkinum hjá Sambandsflokkinum brýtur so nógv frá tí hjá Javnaðarflokkinum, og skuldi hann gerast borgarstjóri, kundi hann ikki vera leysgangari, og tí tók hann ta avgerðina.

Soleiðis kom verandi samgonga við Tjóðveldi í lag fyri fýra árum síðani, og nú er valskeiðið eisini runnið. Og Heðin Mortensen er væl nøgdur við tað, sum samgongan hevur fingið av skafti.

- Eg hugsi, at tað er eindømi, at ein samgonga megnar at uppfylla øll tey lyfti, sum hon hevur sett sær fyri í samgonguskjalinum, men tað hava vit megnað, sigur Heðin Mortensen.

Og við at gjøgnumganga samgonguskjalið má sigast, at Heðin Mortensen hevur rætt – næstan. Tí tað eru onkur fá mál, treyðugt so, sum bara tykjast loyst í eygunum á útinnandi politikaranum. Men málið var tó næstan nátt. Og tað gevur Heðini Mortensen treysti at halda fram.

- Ja, eg ætli at bjóða meg fram aftur til enn eitt valskeið – og gjarna sum borgarstjóra, sigur hann at enda.



*Við samtyktini í løgtinginum í nátt heldur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, at føroyingar eru tryggjaðir móti avleiðingum av fíggjarkreppuni*

# Løgtingið samtykt hjálparpakka

**Við viðgerð í løgtinginum í nátt var sonevndi hjálparpakkin hjá donsku stjórnini, sum skal tryggja bankunum, samtyktur**

FÍGGJARKREPPA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Løgtingið fór í hasti undir at viðgera sonevnda hjálparpakkan hjá donsku stjórnini, sum skal tryggja danska og harvið eisini føroyska fíggjarmarknaðinum.

Løgtingsformaðurin bað løgtingið um at gera frávik í tíðarfreistini, so málið kundi avgreiðast í skundi, tí danska fólkatingið skal atkvøða hjálparpakkan ígjøgnum í dag.

Andstøðan setti fram eitt broytingaruppskot, sum tó varð felt, og eftir hetta var tað eitt samt løgting, sum samtykti upprunaliga uppskotið.

Talan er um eitt uppskot, sum gongur út upp á at tryggja øllum innlánarum øll síni innlán. Hetta verður gjørt við, at bankarnir rinda 35 milliardir krónur í ein grunn, og síðani tryggjar danski staturin tað, sum fer upp um hesa upphædd.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur Jóannes Eidesgaard, fíggjarmálaráðharri, at hóast búskapur okkara grundleggjandi er sunnur, og hóast føroysku peningastovnarnir ikki hava trupulleikar at halda lógarásettu solvenskrøvini, verður mett neyðugt við einum tiltaki sum hesum.

- Orsøkin er, at heimsumfatandi fíggjarkreppan hevur gjørt tað nærum ómøguligt hjá peningastovnunum at útvega neyðugt gjaldføri. Teir stovnar, ið hava nóg mikið av gjaldføri, vilja ikki læna til aðrar peningastovnar. Um einki verður gjørt, kann hetta fáa neiligar avleiðingar fyri borgarar, virki og samfelagsmenningina sum heild, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Neyvan vandi fyri íslendskari fígging

Uppskotið kemur at kosta einstøku peningastovnunum eina munandi upphædd.

- Fyri føroysku peningastovnarnar verður talan um tilsamans umleið 100 milliónir krónur um árið í tvey ár í garantiprovisjón. Hartil kann koma gjald fyri veðhald, sum í mesta lagi kann verða umleið 260 milliónir krónur tilsamans, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hetta tryggjar sum nevnt føroyska fíggjarmarknaðinum, og vandin fyri at missa innlán er púra av.

Samstundis verður mett, at fyritøkur í Føroyum, sum hava fígging hjá íslendsku stórbankunum, ikki eru í vanda fyri at verða koyrdar á húsagang.

Bæði Sigurd Poulsen og aðrar vælvitandi keldur innan fíggjarheimin meta, at bankarnir neyvan fara at krevja lánini aftur her og nú, tí tá er stórur vandi fyri, at bankarnir missa meiri pening.

Íslendski sendimaðurin í Føroyum, Eidur Guðnason, vil ikki gera beinleiðis viðmerkingar til støðuna, men sigur, at íslendingar eru eitt dugnaligt og væl útbúgvið fólkaslag, og at hann ikki ivast í, at teir fara at ríða stormin av.

So alt í alt sær nú út til, at føroyingar sleppa snikaleysir undan teirri fíggjarkreppu, sum herjar um allan heim.